



**Tórhallur á Oyrabakka:**

# Sildarok í Sundalagnum

**Vit halda áfram við frásøgnini hjá Tórhalli. Tey flyta av Eiði til Norðskála. Í Sundalagnum vóru góður vinnumøguleikar. Har var nógv sild, og genturnar sluppu heldur ikki undan at fara í bátin**



Barndómsheimið hjá Tórhalli við Norðskála. Tey vóru 16 fólk í húskinum. Tey hava kanska ikki øll altíð verið heima í senn. Men kortini….



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

## Flyta til Norðskála

Vit búðu fyrst á Eiði. Pápi og mamma fluttu so suður til Norðskála. Tí er tað ikki heilt rætt, tá ið vit verða søgd at vera av Oyrarbakka. Okkara hús vóru tey sunnastu á Norðskála beint við markið til Oyrarbakka.

Eg havi ofta hugsað um, hví tey setti seg niður beint norðanfyri Streymin. Poul pápabeiggi flutti eisini, men hann flutti suður um Streym og búsettist á Oyrarbakka.



Skúlin, garðsendin og dansistovan
(Myndirnar av Norðskála eru læntar frá Sunda bókasavni)

Har hvørki fjarðar ella fløðir, meðan tað er beint mótsett norðanfyri.

Kanska er orsøkin tann, at pápa ikki dámdi at sigla um Streymin, har brúgvin nú er. Har kann tað reka sera hart. Tá ið tað rekur kann verða ringt at sigla norður eftir, har tær týdningarmestu útróðrarleiðirnar vóru. Ein munur millum Eiði og Sundalagið er, at tað er brimpláss á Eiði, meðan tað er púra slætt sunnanfyri. Tey roknaðu eisini við at fáa tað betri har suðuri, og tað fingu tey tað eisini.

## Um Norðskála

Her skal verða greitt eitt sindur frá Norðskála, soleiðis sum Freydis Poulsen hevur skrivað í Varðanum:

Bygdin er óivað gomul, men hon er einans fýra merkur, harav ein hálv kongsmørk. Tað hevur tí ikki verið grundarlag hjá fleiri familjum at lívbjarga sær av tí, sum jørðin gav. Harafturímóti hevur tað verið liviligari í grannabygdini Oyri. Har var ein tólvmarkagarður, sum tó fór sundur í 1720. Sama ætt kom at sita við jørðini, men tað skuldi nógv fólk til at arbeiða á hesum stóra garði, og tí eru so nógv fólk at finna bæði innskrivað, gift og børnini doypt, meðan tey búgva á Oyri. Fleiri av hesum fólkum finna vit aftur við Norðskála.

Men eitt so fáment samfelag er ógvuliga sárbært, um okkurt kemur fyri. Í 1745 eru fleiri fólk deyð eftir stutta tíð, so onkur sjúka man hava gingið, og millum 1810 og 1814 er okkurt hent, har fleiri menn í bestu árum við smáum børnum eru farnir. Teir eru ikki at finna deyðir í kirkjubókunum, einki sæst um nakra vanlukku hjá myndugleikunum, og munnligar keldur vita merkiliga lítið ítøkiligt – mestsum einki. Tá ið Kristina gekk burtur í 1920 við fleiri monnum frá Norðskála, skuldi onkur siga, at tá vóru 100 ár, síðan eina aðra vanlukku, sum kravdi fleiri mannalív.

Í 1901 var fólkatalið í Norðskála komið upp á 10 hús við 50 fólkum, og tey næstu 20 árini øktist fólkatalið til 100 fólk í 20 húsum. Tá kom ein steðgur í húsatalið, men barnatalið vaks rættiliga nógv. Viðmerkjast skal tó, at umframt sethúsini fekk bygdin hesi árini bæði skúla og handil, og í 1932 kirkju.

## Skúlin

Skúlin var beint við kajuna í Norðskála. Skúlarnir vóru annars so gamlir. Skúli var eisini á Oyri. Pápi og Óli í Búrstovu vildu hava bygt skúla, so skúlagongd kundi vera hvønn dag. Men tað vildu teir ikki. Tað vóru serliga



Norðskála skúli

Oyramenn, sum vóru ímóti at byggja ein skúla á Oyrabakka. Vit gingu bert í skúla aðra hvørja viku. Tað var ein ferðalærari, sum kallaðist Maria. Vit vóru kanska eitt sindir forherðaðir. Eina ferð varð eg spurdur, hvussu nógv føll ið vóru. So fór eg at rokna upp: eystfall, vestfall, reyvafall og so framvegis. Tá var Maria óð. Eina ferð eftir, at eg var blivin vaksin, sigi eg við Mariu: "Vit vóru vist eitt sindur keðiligir, ha". "Nei", svaraði hon aftur, "tit vóru so fittir".

Eg dugi ikki við øllum hesa skúlaskapinum í dag. Vit fóru uppá skiparaskúla. Sjálvsagt høvdu vit nógvar feilir. Nógvir av hinum næmingunum høvdu gingið í realskúla og dugdu so nógv betur. Teir høvdu hug til at grína eftir okkum. Men tá sigur Debes Christiansen, royndur skipari, sum var lærari, at "tit skulu ikki grína at teimum. Tit skulu minnast til, at hesir menninir koma av Suðurlandinum, meðan tit hava gingið í skúla".

## Fleiri møguleikar í Sundalagnum

Her í Sundalagnum vóru eisini fleiri møguleikar enn á Eiði, tí her kundi umframt vanligan útróður eisini fiskast sild. Pápi var eisini væl útgjørdur til sildaveiðu. Hann átti motorbát, maskinbát, fýramannafar og ein ritubát, sum teir kalla. Umframt hetta átti hann eisini gørn av øllum slag. Tað vóru trýkvarta(tumma)gørn, tummagørn og fimmkvarta(tumma)gørn. Nýtslan av gørnunum valdaðist árstíðini. Trýkvartagørn vórðu nýtt um veturin, tá ið sildin var smæst. Fimmkvartagørn vórðu nýtt um várið, tá ið sildin var størst, og tummagørnini nýttu vit um summarið. Pápi átti í minsta lagi eini 12 gørn av hvørjum slag. Hetta gav møguleika fyri at fáa mest møguligt burtur úr.

## Gjørdu kvetti við nót

Pápi átti eisini seiðanót saman við grannahúsinum, men hon var eisini nýtt til at fiska sild við. Við